## DAGSINS MEINING

# Eitt skilagott formansval

Nógv hevur verið tosað og skrivað um úrslitið av valinum, um demokrati, um Stýriskipanarlóg, um veljarans dóm osfr. Tann javnstøða, sum tók seg upp í millum samgongu og andstøðu hevur elvt til orðaskifti um, hvør vann valið, og hvør skal stýra. Sum størsti flokkur hevur Sambandsflokkurin víst á, at hann átti at staðið á odda fyri eini samgongu. Men hesum forðar Stýrisskipanarlógin í ávísan mun fyri, nú tá hon jú sigur, at løgmaður ikki nýtist at geva sessin frá sær, nú hann ikki hevur ein meiriluta ímóti sær.

Kanska til alla Guds lukku eydnaðist tað demokratiinum at sigra, tá størsti flokkur fekk tingformannin. Vit vita ikki, hvør samgonga verður veruleiki og hvør verður løgmaður – um Sambandsflokkurin í heila tikið verður við í eini samgongu. Út frá hesum má sigast, at tað var heppið fyri vilja veljarans, fyri demokratiið, at størsti flokkurin og sigursharrin til valið fekk tingformanssessin. At tað so eisini er ein fyrrv. floksformaður og fyrrv. løgmaður, ið vann dystin um henda landsins mest tignarliga álitissess ger ikki støðuna verri, tvørturímóti, Føroya løgting hevur við hesum vali fingið ein tignarligan formann. Við sínum mongu og drúgvu royndum sum politikari og við eini sera áhugaverdari fortíð sum undangongumaður í føroyskum vinnulívi er valið av Edmundi Joensen til tingformann eitt gott val. Hann avloysir ein tungvektara í føroyskum politikki, Finnboga Ísakson, sum so sanniliga eisini hevur sett sín dám á politiska lívið her á landi seinastu øldina við sínum bæði sera greiðu og oftani sarkastisku útmeldingum men eisini fyri síni evni og vilja til samstarv við aðrar flokkar og politikarar. Løgtingið er vorðið fátækari, nú Finnbogi er givin.

Aftur til politiska gerandisdagin. Alt er ógreitt og umhugsar løgmaður støðuna. Ráð okkara til hansara og ikki minst til Sjálvstýrisflokkin eru ikki at víkja frá royndunum at skipa eina breiða samgongu. Tað má og skal bera til so ella so. Vil løgmaður ikki leggja kongin men halda fram við royndum sínum, mugu vit bara vóna, at hann velur breiðu samgonguna, hvussu henda so enn sær út. Jenis má ikki sleppa at vera tungan á vágskálini, og framhald av verandi samgongu er heldur ikki ráðiligt. Okkurt bendir á, at Tjóðveldisflokkurin sær Jenis sum frelsaran, og tað er lítið hugaligt at síggja, at flokkurin bara vil brúka Jenis til eittans ting, og tað er at halda Javnaðarflokkin uttanfyri. Tað eiga hvørki løgmaður ella Kári Post at lata sær lynda. Tað er burturvið av E at siga og halda, at við Jenis kann fullveldistilgongdin halda fram sum einki var hent. Hetta er ikki so. E gloymir, at tað hevur verið val, og at fullveldisvongirnir í A og D taptu, og at hesir flokkar í dag liggja nógv nærri C í sjálvstýrismálinum, og tí vil ein samgonga uttan um C, sum tjóðveldisfólk dyrgja eftir, als ikki verða í tráð við veljarans dóm. Kanska Hvítusunnuhalgan fer at geva monnum og kvinnum neyðuga rásarúmið til at lata vit og skil sigra – og felagsnevnarin fyri tað er ein breið samgonga við høvuðsdenti á miðjuna í politikkinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er Fólkaflokkurin hugklovin (skisofrenur)

**Ábraham Mikladal**

Stevna floksins er greið:

**I** Hin føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) er ein liberalur, sosialur og demokratiskur sjálvstýrisflokkur.

**II** Tjóðskaparmálið
Tjóðskaparliga stavnhald fólkafloksins er, at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Hetta ber í sær, at endamál floksins er fult sjálvstýri fyri Føroyar, soleiðis at vit fáa lóggávuvald á øllum økjum og -úteftir telja við sum suverenur statur javnbjóðis øðrum sjálvstýrandi londum. (Stevnuskrá Fólkafloksins)

og hetta er tað, ið borðreitt var við til valið:

Løgtingssamtyktin um føroyskt sjálvstýri skal fylgjast. Sjálvstýristilgongdin er komin í eina trygga legu, soleiðis at vit innan avtalaða tíðarætlan kunnu taka fulla ábyrgd av øllum málsøkjum bæði politiskt, umsitingarliga og fíggjarliga. (Valskrá Fólkafloksins 2002)

Men í sama flokki eru persónar, ið hava hesa stevnu og valskrá:

**I** Hin føroyski Fólkaflokkurin (radikalt samband) er ein liberalur, sosialur og demokratiskur sambandsflokkur.

**II** Tjóðskaparmálið
Tjóðskaparliga stavnhald fólkafloksins er, at í Føroyum skulu danir ráða. Hetta ber í sær, at endamál floksins er heimastýrið fyri Føroyar, soleiðis at vit fáa lóggávuvald á nøkrum økjum og -úteftir telja við sum hjáland.

Løgtingssamtyktin um føroyskt sjálvstýri skal ikki fylgjast. Sjálvstýristilgongdin má ikki koma í eina trygga legu, soleiðis at vit innan avtalaða tíðarætlan kunnu taka fulla ábyrgd av øllum málsøkjum bæði politiskt, umsitingarliga og fíggjarliga.

Hesir persónar verða goymdir burtur tær seinastu vikurnar av valstríðnum, fyri ikki at forkoma glansmyndina av Fólkaflokkinum, sum sjálvstýrisflokkur.

Tá valið er av, taka hesir ræði aftan fyri leiktjaldi. Teir seta dagskránna og gera sítt ítarsta fyri at fora fyri at veruliga stevna og valskrá floksins verður fylgd.

Kæri lesari hugsa teg um, og tú ásannar at so er.

# Hvør stendur nú saman?

**Zakarias Wang**



Á løgtingsvalinum 1962 var úrslitið tað, at teir flokkar, sum í 1946 taptu fólkaatkvøðuna, fingu hetta burtur úr`

| | B | C | í alt |
|---|---|---|---|
| atkvøður | 3082 | 4167 | 7249 |
| % | 20,3 | 27,5 | 47,8 |
| tingmenn (av 29) | 6 | 8 | 14 |

Sjálvstýrisflokkarnir fingu hin vegin hetta úrslit:

| | A | D | E | F | í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| atkvøður | 3068 | 892 | 3281 | 674 | 7915 |
| % | 20,2 | 5,9 | 21,6 | 4,5 | 52,2 |
| tingmenn (av 29) | 6 | 2 | 6 | 1 | 15 |

Tá segði Poul Petersen, sum hevði verið tingmaður hjá fólkaflokkinum síðan 1940, at tá ið Føroya fólk vildi hava sjálvstýri, so helt hann ikki at fólkaflokkurin skuldi forða fyri hesum, sjálvt um honum ikki dámdi summar av teimum monnum, sum hann harvið kom at vera saman við.

Hesu ferð hava sjálvstýrisflokkarnir fingið enn størri undirtøku enn tá. Hvussu man tað nú fara at ganga hjá hesum flokkum við at vera lýðin boðskapi Føroya fólks?

# Hevur val verið?

**Marjus Dam**
*Sambandsflokkurin*

Vit hava júst havt eitt val, har núsitandi samgonga hevur mist meirilutan. Men løgmaður tvíheldur um maktina – tí hann var valdur – í 1998!

Sambart stýrisskipanarlógini kann hann sita – t.v.s. at juridiskt hann hann sita. Men moralskt haldi eg ikki, at hann kann sita – Tí veljarin vísti á valinum í 2002 greitt, at hann ikki ynskir, at núsitandi samgonga heldur fram. Tí situr núverandi samgonga uttan nakran meiriluta. Greiðari kann tað ikki sigast.

Serliga skal havast í huga, at Sambandsflokkurin nú er størsti flokkur, og at núsitandi samgonga misti 2 umboð til Sambandsflokkin.Ein snaring inn í positivt samstarv og ríkisfelagsskapin.

Og um Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin í valstríðnum ikki høvdu lagt leiðina inn í miðjuna í føroyskum politikki, so høvdu teir mist enn meira – til Sambandsflokkin.

Nógvir Fólkafloksveljarar vóru snýttir av Fólkaflokkinum í 1998 – tí flokkurin fór so langt á loysingarleið við Tjóðveldisflokkinum, at ongin munur var á hesum flokkum. Hetta royndu teir at bøta til valið, við at taka frástøðu frá Tjóðveldisflokkinum til valið. Loysingarvongurin í Fólkaflokkinum fekk ein dyggan undir vangan og vóru fleiri av hesum als ikki vald inn á ting. Um broytingar vóru, har forskjótingar hendu frá Fólkaflokkinum til Tjóðveldisflokkin, so hevði støðan verið ein onnur. Fólkaflokkurin kann tí ikki snýta veljarar sínar einaferð enn við at fara á ræma tjóðveldisleið.

Um valið skal virðast í 2002 – ikki í 1998 – so má ein nýggj samgonga síggja dagsins ljós. Ein samgonga, har skynsamar broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum verða gjørdar innan ríkisfelagsskapin. Og har ein breið samgonga lítir fram, og byggir land eftir kreppuna. Ikki við at tøma landskassan, við at gera risa yvirtøkur. Men fyrst og fremst við at hyggja at samfelagið og fólki okkara, og tryggja, at hesi fáa best møgulig viðurskiftir at liva undir.

Val hevur verið, og vit hava ikki brúk fyri lappaloysnum. Allarminst at lappa eina samgongu saman - ið hevur verið óarbeiðsfør av klandri í 4 ár.

Nú hava vit havt val. Og veljarin hevur víst á nýggjar samgongumøguleikar. Tað eigur løgmaður at virða. Og tað rokni eg við, at hann fer at gera.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Hanus, Kári og Spælimenninir á konsertferð



25 ára haldið hjá Plátufelagnum Tutl heldur fram. Farna vikuskifti vóru skotarnir Sandy Brechin og Fiona McKenzie og estlendskir jazz-tónleikarar og vitjaðu, og komandi vikuskifti og komandi viku skipar Tutl fyri fólkatónleikarkonsertum við bólkinum Spælimonnunum og sangarunum Hanusi G. Johansen og Kára Sverrissyni.

### Spælimenninir

Bólkurin Spælimenninir í Hoydølum varð stovnaður í 1974 og var fyrsti bólkurin, ið gav plátu út á Tutli. Henda plátan eitur sum bólkurin, "Spælimenninir í Hoydølum", og hon kom út í 1977. Síðani tá er bólkurin broyttur av og á og manningarnar hava verið skiftandi; tó hevur klaverleikarin Kristian Blak verið uppi í bólkinum øll 28 árini, fiólleikarin Janne Danielsson hevur verið uppi í 26 ár, gittar- og mandolinleikarin Ívar Bærentsen og blokkfloytuleikarin Sharon Weiss hava verið uppi í 24 ár, fiólleikarin Erling Olsen í 22 ár, og fyri eini 20 árum síðani kom amerikanski bassleikarin Charlie Pilzer upp í bólkin. Hesi seks manna enn Spælimenninar og vera aftur at hoyra í vikuskiftinum. Spælimenninir hava higartil givið 7 plátur út; "Spælimenninir í Hoydølum", 1977, "Umaftur", 1978, "Burturav", 1980, "Á ferð", 1984, "Rekaviður", 1984, "Hinvegin", 1986 og "Flóð og fjøra" í 1996. Harumframt munnu Spælimenninir vera tann føroyski bólkurin, ið hevur ferðast mest víða við tónleiki sínum. M.a. hevur bólkurin verið fleiri ferðir á umfatandi konsertferðum í USA, Norðurlondum, Orkney, Hetlandi, Slovakia, Fraklandi og aðrastaðni. Í komandi viku, í døgunum frá 23. til 26. mai, verður bólkurin við á 20. fólkatónleikarstevnuni á Orkney oyggjum, Orkney Folk Festival. Spælimenninir hava verið við á hesi stevnu fleiri ferðir, m.a. tey fyrstu árini, stevnan varð hildin, og vórðu tí biðin um at vera við aftur í ár, nú stevnan verður hildin á tjúgunda ári.

### Hanus G. Johansen

Sangarin, gittarleikarin og lagsmiðurin Hanus G. Johansen hevur spælt og sungið nógv á palli í Føroyum og útlondum og hevur givið tvær plátur út við egnum tilfari; "Gaman og álvara" í 1988 við yrkingum hjá Poul F. Joensen og "Bouquet", ið hann gjørdi og gav út á Plátufelagnum Tutli saman við Aldubáruni í 2000. Á hesi seinnu útgávuni eru yrkingar hjá fleiri ymiskum skaldum. Hanus hevur annars verið við á øðrum útgávum hjá Tutli, eitt nú "Jazz í Føroyum II" og barnaplátuni "Nósa". Kári SverrissonKári ger og syngur sínar egnu sangir, við egnum tekstum og yrkingum hjá eitt nú Janusi Djurhuus. Kári er limur í bólkinum "Enekk", ið umframt at hava spælt víða um í Føroyum og eitt sindur uttanlanda hevur givið tríggjar fløgur út; "Andlit hins tigandi", 1993, "Ver sterk mín sál", 1994, og "Fýra nætur fyri jól", 1997, allar á Plátufelagnum Tutli. Framførslurnar í vikuskiftinum vera leygarkvøldið 18. mai kl. 20.00 í Café Natúr í Havn, har Spælimenninir fara at spæla og hvítusunnudag 19. mai kl. 16.00 umborð á Høganesi í Runavík, har Hanus G. Johansen, Kári Sverrisson og Spælimenninir vera við. Annan hvítusunnudag, mánadagin 20. mai kl. 16.00, vera hesi somu, Hanus, Kári og Spælimenninir, at hoyra á Meiarínum í Havn. Kl. 20.00 byrja Spælimenninir at spæla í Café Natúr. Týskvøldið 21. mai spæla Spælimenninir helliskonsert undir Hestoynni.

# Norrøna eitt stig nærri

Byggingin av nýggju Norrønu heldur fram, og nú er hon eisini komin eitt stig longur. Longu tann 24. august skal Norrøna sjósetast, og sum sæst á myndunum er arbeiðið komið væl áleiðis.



*Norrøna tekur meira og meira skap. Um hálvan fjórða mánaða skal hon sjósetast*